# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Í sambandi við at urnan við **Jákup Thorsteinsson** er komin heim, verður minningarhald í kirkjugarðskapellinum í Havn leygardagin 12. desembur kl. 13.00

## Føðingar

20. november fingu Regina Sunnva Bech og André Delmarsson Kjærbo, Sumba, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4000 gr.

3. desember fingu Harryet Eysturtún Joensen og Andreas Mouritsen, Tórshavn, tvíburar, drong og gentu. Drongurin var 51 cm langur og vigaði 2710 gr, gentan var 49 cm long og vigaði 2360 gr.

3. desember fingu Anna Müller og Meinhardt Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 3950 gr,

3. desember fingu Kristina Hovgaard Clementsen og Jóannes Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3500 gr.

4. desember fingu Ingun og Birni Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4150 gr.

7. desember fingu Arndis Svabo Samuelsen og Eyðfinn Fjallsbak, Valby, DK, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2950 gr.

8. desember fingu Jóna av Vollanum og Bárður Kjeld, Saltnes, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3750 gr.

9. desember fingu Marianna Ole-Jacobsen og Gunnleivur Torleivsson, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4450 gr.

# Teknað fyri Dimmu í 10 ár



*Martin Tórgarð við fyrstu tekningini, sum var í Dimmalætting 2. november 1999*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Mánadagin 14. desember letur ein framsýning upp í hølunum hjá Dimmalætting á Smyrilvegi í Havn.

Talan er um eina sølu-framsýning við karikaturtekningum hjá Martini Tórgarð (yngra), sum hevur teknað fyri Dimmalætting í 10 ár. Martin sigur, at tað byrjaði við, at hann sendi eina karikaturtekning til blaðið. Síðan hevur hann teknað fast í samfull 10 ár.

Martin arbeiðir annars sum sjálvstøðugur timburmaður og hevur ymisk listahandverk sum frítíðarítriv sum at tekna, gera knívar, navnabrettir o.a.

Framsýningin letur upp mánadagin kl. 14 og verður opin til nakað eftir nýggjár. Opið er frá mánadagi til fríggjadag frá kl. 8-16.

*-red*



# Maria Rubeksen

**f. 01.11.1915 - d. 27.11.2009**



1. Ein lítlan blett á Føroya jørð
er øll tann mold, eg eigi.
Eitt stað har reyða rósan grør,
og reinfan prýðir leiðið,
har lotið gjøgnum blómur fer,
mín blettur er.

2. Eg eri rík - eg eigi mold
so mikið, sum mær krevur.
Og hon, eg elski mest á fold,
nú djúpt í moldum svevur.
Tí øll tann mold, mær lívið gav,
er hennar' grav.

3. Ein sólskinsmorgun svav hon inn
til dag, sum aldri endar,
tá várligt lot mær streyk um kinn,
sum hennar' mjúku hendur,
og teskar: "Hon, tú hevði kær,
er ikki har."

4. Lat dustið liggja niðri har,
tað er jú ikki móðir.
Sjálv spákar hon í Edens garð'
við kenningum, so fróir.
Frá mær, Gud, mammu blómu gev
for hennar' strev.

Umsett úr norskum
**Effie**

# MERKISDAGAR

**Diamantbrúdleyp**
Leygardagin 12. des. hava hjúnini Herbjørg og Eiler Egholm, Gripsvegur 29, Tórshavn, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima saman við systkjum og døtrum við familju.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava vit Kára og Abraham Løkin, Runavík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18. Tey ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 221980 (abraham) ella 272777 (Kára) áðrenn fríggjadagin 11. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Prógv**
Bjørghild Djurhuus hevur 4. des. tikið prógv, sum coach frá Grow2 í Danmark.

# Samkoman í Bethel 100 ár

Leygardagin 12. desember eru 100 ár liðin síðan brøðrasamkoman á Vági byrjaði í 1909. Tey vóru fimm fólk: Dias Godtfred og konan Kristina, Johan Nicolai Smith og konan Elin og Kristoffur Larsen, Porkeri, sum komu saman til breyðbróting í húsunum hjá Diasi Godtfred. Síðan 1920 hevur samkoman hildið til í salinum Bethel.

Í sambandi við 100 ára haldið verður eitt serligt tiltak leygarkvøldið 12. desember kl. 20, har samkomusøgan verður lýst við myndum og frásagnum. Suðuroyarkórið og onnur syngja. Eisini sunnudagin verður eitt serligt møti við luttøku úr samkomunum í oynni.

*-red*




Gomul mynd av Bethel. Myndin er tikin eftir eitt møti í 50-unum